# egg
# arnar«

> „ *Í gjár, tá eg kom við klæðum, leikum, leðurmøblum og einum sjónvarpi, vóru kvinnurnar so fegnar, at tær mussaðu meg á kjálkan*
> *- Árni Dam, russiskur konsul*

**FAKTA**

www.portal.fo ber til at síggja kykmynd av vitjanini umborð á Admiral Starikov.



*– Fyrr kastaðu vit hatur á russararnar. Serliga í 1981 fingu russararnir eina harða viðferð. Føroyingar kastaðu rotin egg og tomatir á skip teirra, men í dag góðtaka vit teir, sigur Árni Dam*

verður um lønarviðurskiftini í Russlandi, sigur Konstantin.

– So tað eru ikki rík fólk, vit hava við at gera, men heldur ikki blóðfátøk, leggur Árni afturat.

Ein kvinna kemur inn í skiparakamarið og setur eitt fat við stórum rómakøkum á borðið. Hon sigur ikki tað stóra, men heilsar og biðjur okkum fáa okkum eitt køkustykki á ein serviett aftur við sodavatninum:

– Russararnir eru eitt serstakliga fitt fólkaslag, sigur Árni og fortelur, hvussu glaðar allar kvinnurnar og sjómenninir verða, tá hann kemur við klæðum og øðrum til teirra:

– Í gjár, tá eg kom við klæðum, leikum, leðurmøblum, keyboardum og onkrum sjónvarpi, vóru kvinnurnar so fegnar, at tær mussaðu meg á kjálkan, sigur hann og sker útúr at flenna. Eftir eina løtu tagnar hann og sigur, at russararnir duga ótrúliga væl at umvæla tól.

– Vit geva teimum í heilum sjónvørp og útvørp, sum føroyingar ikki skoyta um. Men eitt, tvey, trý, so hava russararnir longu fingið tólini at rigga.

– Fyrr vóru russararnir ofta á Brennistøðini á Sandvíkarhjalla og funnu ymiskt, teir kundu umvæla og síðan brúka, men tað sleppa teir tíverri ikki longur. Tað er ógvuliga synd, sigur Árni harmur.

### Kastaðu hatur

Spurdur, um russararnir hava tað betri nú enn fyri nøkrum árum síðani, ivast Árni ikki:

– Teir hava tað munandi betri nú. Støðan hjá teimum er nakað tað sama, sum okkara. Fyrr kastaðu vit við nógvum fordómum hatur á russararnar – serliga í 1981 fingu russararnir eina harða viðferð – men í dag góðtaka vit teir og eru góð við teir.

Árni vísir á, at føroysku myndugleikarnir og Landssjúkrahúsið somuleiðis hava verið positiv og hjálpsom mótvegis russarunum seinastu árini:

– Tey ráðandi hava syrgt fyri, at russararnir sleppa frá at sigla heim aftur. Nú kunnu teir flúgva úr Føroyum og heim uttan at fáa sær visum hvørja ferð. Landssjúkrahúsið hevur eisini gjørt eitt stórt arbeiði, og læknarnir eru altíð til reiðar at taka ímóti sjúkari manning, staðfestir Árni.

Enn eina ferð kemur ein kvinna inn í kamarið hjá skiparanum. Hesa ferð við einum stórum fati við nýbakaðum bollum.

Skiparin sigur alt fyri eitt, at kokkurin júst hevur bakað bollarnir til okkara:

– Serstakir kanelbollar frá kokkinum. Fáið tykkum, sigur hann, veipar við ørmunum og fer at leita eftir onkrum. Lítla løtu seinni kemur hann aftur við fýra dósum av sild í laka:

– Hetta kunnu tit taka heim við at eta. Sildina hava vit framleitt, sigur hann og setur seg aftur við skrivaraborðið.

– Tað sosiala hevur stóran týdning í mínum arbeiði, staðfestir Árni enn eina ferð.

Vit takka fyri sildina og fáa okkum ein bolla. Skiparin hevði rætt. Bollarnir eru nýbakaðir og enn heitir.

Árni og skiparin práta aftur saman á russiskum. Ikki skilja vit tað stóra, men brádliga flenna teir í kíki eftir einari krøniku.

Samanumtikið má sigast, at russararnir síggja út til at trívast væl og at hava tað gott umborð. At lønin nú eisini er vorðin betri, ger tað ivaleyst hugaligari hjá teimum at liggja so langt heimanífrá longu vetrardagarnar. Og prikkin yvir i'ið fáa teir óivað við heitum bollum og umsorgan frá Árna.

> „ *Manningin er væl lønt. Flest øll fáa um 4000 krónur um mánaðin*
> *- Konstantin Shulpin, skipari*



# »Gávurnar frá føroyingum eru okey«

**Andrey Gulyaev er yvirstýrimaður umborð á russiska skipinum, Admiral Starikov. Honum dámar væl sjómanslívið, hóast tað er strævið.**

*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

*Hví valdi tú at gerast sjómaður?*

– Eg fór til sjós, tí eg hevði ikki nógv annað at velja ímillum. Tað einasta, eg annars kundi læra til, var at gerast lærari, men tað tímdi eg als ikki. Eg eri somuleiðis føddur í desember, og teleskopið segði, at mær dámar væl at ferðast. Tískil valdi eg at gerast sjómaður.

*Er tað eitt gott starv í Russlandi at vera sjómaður?*

– At arbeiða í banka ella hjá einum oljufelagi er besta starvið, tú kanst fáa í Russlandi. Landið hjálpir ikki sjóvinnuni, hóast oljan er sera dýr í løtuni, og vit hava brúk fyri hjálp. Myndugleikarnir vilja ikki hjálpa okkum, tí teir síggja meira vinning í hinum vinnunum. Tað er harmiligt. Ein sjómaður verður ongantíð ríkur maður í Russlandi.

– Konan hjá mær arbeiðir ikki, men vit fáa akkurát endarnar at røkka saman, tí eg arbeiði sum yvirstýrimaður og havi tískil eitt gott starv.

*Hvat halda tit um klæðini, matin og annað, sum tit fáa frá føroyingum?*

– Tað er í lagi. Klæðini síggja gott út, og summi eru spildurnýggj. Manningin hevur brúk fyri gávulutunum, men eg tími ikki at taka mær nakað við heim. Konan hjá mær hevði ikki lagt nakað serligt í tað. Men um mær vantar onkra troyggja at arbeiða í, fari eg eisini at taka mær okkurt smávegis úr rúgvuni.

*Hvat gert tú, tá tú ert til arbeiðis?*

– Eg gevi manningini góð ráð og stríðist saman við teimum fyri at fáa eitt so gott úrslit, sum til ber. Vit arbeiða tólv tímar í senn, hóast tað ofta tykist sum 24 tímar. Eg kenni ikki øll fólkini umborð serliga væl. Eg eri mest saman við teimum, sum stýra.



*Yvirstýrimaðurin, Admiral Starikov og skiparin, Konstantin Shulpin. Her eru teir í skiparakamarinum*





*Kokkurin í kabússini*